# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

2. juli fingu Kristin Bjørk Tungá og Høgni Nybo, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

3. juli fingu Annika og Oskar Johansen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3400 gr.

3. juli fingu Súsanna og Jákup Lauritsen, Sandavági, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4100 gr.

4. juli fingu Johanna og Eyðun á Bergi, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3350 gr.

4. juli fingu Beinta Simonsen og Erling Arnarson, Sandi, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3700 gr.

5. juli fingu Tanja og Georg Jacobsen, Norðragøtu, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3750 gr.

5. juli fingu Karin Dahl og Kenneth Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3525 gr.

5. juli fingu Brynhild og Niklas Højgaard, Runavík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4205 gr.

5. juli fingu Anna Løve og Hendrik Sørensen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4100 gr.

6. juli fingu Malan Poulsen og Jan Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3800 gr.

7. juli fingu Rúni og Jóhanna Johansen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3850 gr.

7. juli fingu Sæunn L. Petersen og Bjartur Nolsøe, Argjum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4500 gr.

7. juli fingu Linda Joensen og Emil Johansen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3725 gr.

8. juli fingu Charlotta og Líggjas Joensen, Toftum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

## Dagurin

**12. juli. Heinrikur.** deyður í 1024. Týski keisarin Heinrikur II var giftur við Húngunn, ið merkir *mæt stríðskvinna*. Pávin Eugen III Skírdi hann halgimenni í árinum 1146. Upprunaliga týskt navn, samansett av orðunum *heim* og *ríkur*.

**13. juli. Margreta,** deyð umleið ár 300. Var úr Antiokia, og foreldrini vóru heiðin. Hon tók við kristnari trúgv. Av tí at hon ikki vildi lovast heidna herføraranum Olymbrias, varð hon hálshøgd. Ein margretumessa hevur verið hildin. Margreta merkir *perla* á grikskum máli.

**14. juli. Bonaventura**, deyður í 1274. Hann var úr Italiu og æt upprunaliga Giovanni Fidanza, men halgisøgan sigur, at tað var sjálvur hin heilagi Frans, sum gav honum navnið Bonaventura, ið merkir *eydnurík hending.* Bonaventura varð seinni biskupur í Albano, og hann gjørdist ein tann mætasti lærumeistarin hjá katólsku kirkjuni í miðøld.

## Andlát

3. juli
Martin Johannes Egholm Frederiksen, 70 ár
Sólgerð Johanna Djurhuus, Havn, ættað úr Vági, 62 ár

6. juli
Jóan Pauli Andreasen, nevndur Palli í Norðradali, 70 ár
Aslaug Korneliussen, fødd Magnussen í Leynum, bús. í Florø í Noreg, 73 ár

7. juli
Kristian Sigvald Djurhuus, Hvalvík, ættaður úr Kollafirði, 96 ár
Jacob Petersen, Sandvík, 86 ár

# Minningarorð um Jóannes Østerø



Tann 25. juni andaðist ein vælkendur og nógv avhildin maður, ættaður úr Mikladali, búsitiandi í Vági. Tað er Jóannes.

Jóannes var ein sjáldsamur maður. Hann var vinsamur við øll fólk. Altíð helt hann fyri: Nú vinurin, hvussu gongur. Hann var altíð við tí góða orðinum. Sum ein helt fyri, at um nakar gekk í Jesu fótaspor her á jørðini, so var tað Jóannes.

Tá vit vóru í Sumba og ferðaðust, so var altíð farið ein túr til Vágs at vitja Elinborg og Jóannes. Eitt hugnaligt heim.

Har kom eg at uppliva hendan sjáldsama mann. Tú hoyrdi hann bara siga lívgandi og vælmeint orð um alt og øll.

Jóannes nevndi ofta um Guds skaparverk, sum hann undraðist á. Jóannes hevði nógv størv í Vági, men nú hevur hann lagt árarnar inn og farin heim til sín Frelsara, tí Jesus og hann høvdu nógv saman.

Hann kundi tí siga á sjúkralegu sínari, eins og Jesus segði: Faðir, í tínar hendur gevi eg anda mín. Luk. 23.46.

Og syngja sangin:

*O tann dag, tá Jesus kemur.*
*Hann sum mínar syndir bar,*
*Tekur móti mær í skýnum*
*Og meg leiðir heim við sær*

*Jesus hond í hond meg leiðir,*
*Gjøgnum perluportrið heim,*
*Hvítum klæðum, sigurskrúnu.*
*Einglar syngja: „vælkomin heim".*

*Ærað verið minnið eftir hendan góða vin.*

**Símun P. Poulsen**

## Emma og Mærsk Mc-Kinney Møller 90 ár





Týsdagin 8. juli fylti Emma Mc-Kinney Møller 90 ár og sunnudagin 13. juli fyllir maðurin, Mærsk Mc-Kinney Møller í Keypmannahavn eisini 90 ár. Emma er dóttir Olgu, f. Neergaard, og Niels Rasmussen. Mærsk Mc-Kinney er sonur Chastine Estelle Mc-Kinney og Arnold Peter Møller, vanliga nevndur A.P. Møller, reiðara.

Mærsk MC-Kinney er ríkasti maður í Danmark. Í 1940 bleiv hann sameigari av reiðaravirkinum A.P. Møller. Hann er eisini formaður í stýrinum fyri Dampskibselskabet af 1912 A/S, Odense Staalskibsværft A/S, og í fleiri øðrum feløgum og grunnum sum hoyra til Mærsk konsernina bæði í Danmark og uttanlands. Hann fekk Tietgen-Prisen i 1979, bleiv t.d heiðursborgari í Svendborg í 2001. Emma og Mærsk Mc-Kinney hava verið gift í 63 ár. Tey fyrstu árini búðu tey í New York, hetta var undir seinna veraldarbardaga. Tey eiga tríggjar døtur, Leise, f. 1941, Kirsten, f. 1944, og Ane, f. 1948. Tann Elsta dóttirin, Leise, er við í stýrinum og tann yngsta, Ane, er næstformaður í stýrinum fyri A.P.Møller A/S. Tað er ikki siðvenja at gera nakað burtur úr rundum føðingardøgum hjá Mærsk hjúnunum, og 90 ára føðingardøgunum verður onki undantak.

A.P Møller Gruppen, sum hevur høvuðssætið á Esplanaden í Keypmannahavn, hevur yvir 60.000 fólk í starvi og skrivstovur í yvir 100 londum. Skipaflotin er upp á umleið 250 skip, har ein stórur partur av yvirmonnunum eru føroyingar. Teir eiga m.a. flogfelagið Maersk Air og handilsketurnar Bilka, Føtex og Netto. Konsernin er mett til at hava eitt virði upp á umleið 150 milliardir krónur. Grunnurin, " A.P. Møller og hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal", hevur latið gávur til Tórshavnar Sjómansheim, Føroya Sjómansskúla og onnur áhugamál í Føroyum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

## Palli Dalsgaard 75 ár



*Palli Dalsgaard við nýggju bók síni »Staðanøvn uttangarðs í Skálavík«*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mánadagin 14. juli fyllir Palli Dalsgaard í Skálaví k 75 ár. Palli er føddur og uppvaksin í Skálavík, sonur Astrid, f. Jacobsen, úr Skopun, og Axel Dalsgaard, á Mølini í Skálavík. Størsta partin av lívi sínum hevur Palli koyrt rutukoyring millum bygdirnar í Sandoynni. Henda rutukoyring við mjólk, frakt og posti, varð ofta koyrd undir sera ringum umstøðum. Allar bilumvælingarnar vórðu gjørdar í bilhúsinum sum pápin, Axel Dalsgaard, og synirnir høvdu í Skálavík. Hóast Palli ongan annan skúla hevði enn barnaskúlan, hevur hann lært nógv av teimum fólkum, hann hevur verið saman við, sum t.d. í handlinum á Mølini í Skálvík, fyri honum var handilin ein skúli. Eisini var hann sum ungur nógv saman við fólki í Skopun, sum høvdu verið á háskúla í Danmark, og lærdi hann nógv av teimum. Veturin 1972-73 var Palli umskúlaður á skúlanum norðuri við Áir, tí skúlanum sigur hann seg hava fingið sera nógv burtur úr. Í 1973-74 hevði hann skrivstovustarv á Royndarstøðini í Hoyvík. Eftir tað fekk hann starv á Bil- & Maskinverkstaðnum á Sandi, hetta starv røkti hann í 18 ár. Palli hevur altíð havt hug at skriva, vit síggja ofta hansara lesarabrøv í bløðunum, hann hevur eisini savnað hópin av tilfari um bilasøguna í Sandoynni til eina komandi bók, hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, um føroysku bilasøguna. Seinasta fríggjadag kom Palli út við eini sera snøggari og áhugaverdari bók við heitinum "Staðanøvn uttangarðs í Skálavík". Bókin er um staðanøvn sum Leifur Tróndarson (1901-1980) í Skálavík hevur savnað. Palli giftist við Ragnhild (1933-1996), f. Joensen, úr Skálavík. Ragnhild og Palli fingu fýra børn, tey eru: Jovina, Atli, Maria og Anthonius. Palli verður burturstaddur føðingardagin.

## Marin Skála 50 ár



Leygardagin 12. juli fyllir Marin Skála í Hoyvík 50 ár. Marin er fødd og uppvaksin á Sandi. Foreldrini vóru Martin Christian Hentze, nevndur Martin hjá Evu-Peturi og Maren Susanne Sophie, f. Johannesen, vanliga nevnd Marsanna. Marin er næstyngst av einum systkinaflokki upp á seks, við fýra beiggjum og einari systir. Marin fór til Havnar sum 14 ára gomul, hon var hjá stórabeiggja, Peturi, og hjálpti til í húsinum til hon fór oman í Skálabúðina, har hon var arbeiðsgenta, tey fyrstu árini, hjá Ásu og Jens John Østerø. Um kvøldarnar gekk hon í handilsskúla. Í Havn møtti hon Kára, sum hon giftist við í 1974, tey eiga tvey børn, Kristian Martin og Súsonnu og seks ommubørn, Kára, Óla Kristian, Bjarna, Ragnar og Rógva, ið eru tvíburar, og Marin.

Marin byrjaði í Skálabúðini í 1971 sum krambarkvinna, har hon m.a. seldi Lee Cooper buksir, sum einhvør kvinna við "respekt" fyri sær sjálvari átti eitt par av tá. Seinni opnaði Mótaskálin, sum man kann siga er stoltleikin hjá Marin, tað er har frá tey flestu kenna hana. Somuleiðis sæst Marin ofta ganga túr við ommubørnunum, sum eru ótrúliga heppin at hava eina ommu, sum er so góð við tey. Marin er eisini aktiv í frítíðini, hevur sungið í kristiliga sangkórinum í mong ár, í løtuni er hon á veg heim aftur av Danmarkarferð. Ikki er tal á teim bindiklubbum hon gongur í.

Marin, hjartaliga tillukku við degnum, takk fyri tað sum tú ert fyri okkum øll.

**Ynskja lítlasystir og stóribeiggi**

**Er tín gamli pick-up ov góður at tveita burtur?**



So kann tað verða at loysnin er at skifta lastina

Vit hava ein hóp av lastum á goymslu, nýggjar og brúktar, smáskaddar og ikki skaddar

**Prísir um kr. 6.000,-**

AVIS mazda SCANIA

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35

Sosialurin 341800

Vegna summarfrí, verður verkstaðið stongt frá 21. juli til 18. august

AVIS mazda SCANIA

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35

Sosialurin 341800

**Suzuki Intruder vs 1400**



- Árg. 10/96
- Ccm 1400
- Koyrt einans 16000 km
- Er nógv umbygd
- Sær út sum nýggj

**Prísur: kr. 135.000,-**

**Ring á tel 21 27 89**

Sosialurin 341800

Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar